# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 06.07.2020 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Poul Laust Christiansen (fyri Sten Spange Larsen)

Ikki møtt: Magni Bertholdsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um stuðul til skipanina/appina «Renn Fyri Lívi».**
   Ætlanin er at seta eina skipan í verk, har fólk runt landið skráseta seg tøk at fara út at veita fyrstuhjálp, til sjúkrabilur kemur á staðið.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at stuðla hesum, um helvtin ella fleiri kommunur verða við, t.v.s. í mesta lagi kr. 3.000,00.

2. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag.**
   Søkt verður um fíggjarliga stuðul til kappingarárið 2020.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 15.000,-.

3. **Umsókn um stuðul til verkætlanina ”Vitan um Demens” frá Alzeimerfelagnum.**
   Felagið arbeiðir við at týða eina app ”Vitan um Demens”.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at stuðla við kr. 5.000,-.

4. **Umsókn um stuðul frá TB-Flogbólti.**
   Søkt verður um stuðul til kappingarárið 2020/21 og 2021/22.
   **Avgerð:**
   Stuðul er játtaður til kappingarárið 2020/21 í juli 2019.

5. **Umsókn um stuðul til Fótbóltsskúlan við Stórá 2020.**
   Árligi fótbóltsskúlin við Stórá verður hildin í døgunum 12. – 14. august.

**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 2.000,-.

6. **Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 180 l, Hvalba.**
Bygging av nýggjum sethúsum á matr. nr. 180 l.
**Tekniska nevnd:**
Nevndin mælir til at geva byggiloyvi sambært hjáløgdu treytum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til sethús á matr. nr. 180 l sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og BK17. Íbinding til kloakk skal gerast í samstarvi við kommunala myndugleikan.

7. **Umsókn um byggiloyvi til hoyggjhús á matr. nr. 58 a, Hvalba.**
Bygging av nýggjum hoyggjhúsi á matr. nr. 58 a.
**Tekniska nevnd:**
Nevndin mælir til at geva byggiloyvi sambært hjáløgdu treytum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til hoyggjhús á matr. nr. 58 a sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og BK17. Íbindingin í kloakkina skal gerast í samsvari við kommunala myndugleikan.

8. **Tilboð uppá kortskipan frá Sp/f Munin.**
Tilboð frá Sp/f Munin umfatar skipan til rottutýning v.m. og ArcGIS kortskipan.:
**Tekniska nevnd 27.06.2020:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Munin, tá tað er henda skipan, ið brúk er fyri til skráseting av ymiskum.
**Fíggjarnevndin 06.07.2020:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f Munin.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

9. **Skriv frá borgara um ymisk viðurskifti.**
Skrivið umfatar ymisk øki og er tí beint í Teknisku-, Trivnaðar- og Vega/havnanevndina.
1. Gongu/súkklubreyt vegastrekkið úr Nesi til á Tanganum.
2. Seyður á bønum um summarið.
3. Grót í mølini í Nesi.
4. Bonkur niðri í Støðni í Nesi.
5. Skúlin í Nesi.
6. Grønu økini í bygdini.

**Vega- og havnanevndin 17.06.2020:**

1. Hvalbiar Kommuna hevur frá 2018 til 2020 heitt á Landsverk um at gera eina gongu / súkklubreyt á hesum vegastrekki í sambandi við nýgerð av vegi til tunnilin. Kommunan arbeiðir framhaldandi við hesum máli.
3. Hvalbiar Kommuna er í ferð við at bøta um atkomumøguleikarnar fyri eigarar av nýggju neystunum í Nesi og hevur lagt 15 m. av grótkastinum niður. Ætlanin er at slætta hetta við fínari tilfari, so hetta kann nýtast fyri fyrst.

**Trivnaðarnevndin 17.06.2020:**

2. Nevndin hevur viðgjørt henda trupulleika og er samd um at arbeiða víðari við hesum.
4. Beinkirnir eru komnir uppá pláss aftur og fleiri verða bílagdir.
5. Skótaliðið brúkar skúlan í Nesi sum nú er. Skúlin kann tó leigast, um áhugi er fyri hesum.
6. Grøna økið uppi við dagstovnin verður fríðkað um í løtuni, har m.a. gøtan, ið gongur gjøgnum spæliøkið, verður løgd uttanum stovnin. Bonkur verður settur upp og brúgv gjørd á økinum.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at svara sambært viðgerðunum hjá nevndunum.

**10.<u>Skriv frá borgara viðvíkjandi spillivatni</u>.**

Gjørt verður vart við, at spillivatn samlast inni í kjallaranum, tí frárenslið, ið kemur út úr garðinum niðanfyri húsini, er farið undir í sandi og tískil tippist.

**Tekniska nevnd 22.04.2020:**

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at heita á arbeiðsformannin um at finna eina fyribils loysn á akutta tørvin og annars eina varandi loysn.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt, at gravmaskinan hjá kommununi skal grava sand frá, tá tørvur er á tí og at spillivatnið frá húsarhaldinum verður ført í ein samlibrunn, tá avgjørt er, hvønn veg kloakkin verður førd.

**11.<u>Byggisamtyktin – dagføring av kortum</u>.**

Broytingarnar í býarskipanarkortunum eru:

Húsvegur á Hamranesi í sambandi við undantaksloyvi til bygging, húsvegurin skal steðga við byrjan av matriklinum til havnaøkið

Smiðjan hjá Manna Næs

Økið á Hólum

Bátahylurin, broyting av tekningum

Økið við kirkjuna í Sandvík til bilstøðlar

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt, at Tekniska nevnd fær HMP Consult at gera broytingarnar á kortinum, ið verður lagt fram til almennar viðmerkingar sambært kunngerð um býarskipanir.

**12.<u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundur lokin kl.19.30

| | | |
|---|---|---|
| Janus Thomsen | Eir J. Norðberg | Niels Olaf Eyvindsson |
| Gunnhild Mortensen | Rúni Thomsen | Poul Laust Christiansen |